LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TOYOTA COROLLA
árg. 87, sýnaður í aug. 2000, til søluf fyri 10.000 kr.
Tlf. 321026

NISSAN SUNNY 1600 SGX
Coupe, árg. 88, hevur el-rútar, el-spegl og sóltak, koyrir ikki, men hevur eykalutin, ið skal nýtast til bilin. Kostnaður 8.000 kr.
Tlf. 251904 - 373880

KROSS KETUR
155x13, til søluf fyri 400 kr.
Tlf. 310352

TIL SØLU
Fýra góð heilársdekk, 185/65 R 15, til søluf fyri 300 kr.
Tlf. 448487

CITROËN BX 19 GTI
Til søluf sum eykalutir fyri 7000 kr. Sýnaður í nov. 2000, koyrir væl.
Tlf. 316717 eftir kl. 17 vanligar dagar

OPEL ASCONA
til søluf. Árg. 86. Kann nýtast til eykalutir.
Tel: 45 66 61

MITSUBISHI CARISMA
Nýsýnaður, myrkabláur Mitsubishi Carisma, árg. 96, spoylarasett, sportsfelgur og vel, hevur koyrt 63.400 km, væl viðfarin, til søluf um hóskandi boð fæst.
Tlf. 216473

4 NÝGGJ PÍKADEKK
við nýggjum felgum, 185-65-14, til søluf.
Tlf. 448990

PEUGEOT 405
Reyður Peugeot 405 til søluf sum eykalutir.
Tlf. 424116

BILUR TIL SØLU
Ein Ford Sierra 1,6 CLX til søluf, um hóskandi boð fæst. Bilurin er árg. '88, koyrt uml. 160.000 km og nýsýnaður.
Tlf. 039290820

TIL SØLU
Toyota Landcruiser, model LJ 70, árg. 86, nýsýnaður og í góðum standi.
Tlf. 210542

YNSKIST
Sportsfelgur til Ford Escort ynskjast bíliga til keyps.
Tlf. 444737

VW TRANSPORTER
Árg. 1986 til søluf fyri 4.000 kr. ella til hægri Við í keypinum eru 4 nýggj summardekk og 4 nýggj píkadekk. Onkrir trupulleikar við motorinum, men annars í góðum standi.
Tlf. 315877

EYKALUTIR
til Pajero til søluf. Bakhurð, hjelmur, vinstri skermur (nýggjur), turbina, dynamo, lyktir o.a. Alt verður selt saman fyri kr. 2.000.
Tel: 21 73 22

CHEVROLET VAN.
svartur, diesel 6,2, árg. 89, alu-felgur, gáttir, cd-anlegg, til søluf um hóskandi boð fæst.
Tlf. 222845

HVÍTUR MAZDA 626
árg. 91, nýsýnaður, í góðum standi, til søluf. Skal síggjast.
Tlf. 447343

TIL SØLU
Fýra felgur til SAAB 99 til søluf fyri 400 kr.
Tlf. 424151 ella 215477

TIL SØLU
Deilir til Honda Accord, árg. 87-89 bíliga til søluf.
Ring 225040 og hoyr meira

OPEL REKORD
Ein Opel Rekord 2.2i bíliga til søluf. Heilur ella sum deilir.
Ring 225040 og hoyr meira

FORD SIERRA
árg. 87, sum eykalur: tangi, lyktir, gearkassi, el-rútar.
Tlf. 315864

NISSAN BLUEBIRD
Hevur nakar ein Nissan Bluebird til søluf sum eykalut ella ein sum koyrir.
Tlf. 441422

TOYOTA HI-LUX 2.4D
4 x 4 við lang last, ca. 125.000 km, árg. 85, sýnaður og góðkendur 18.1.2001.
Tlf. 221582

SPORTFELGUR TIL SØLU
15" OZ Raicing passa m.a. til Toyota Corolla til søluf fyri 4000,- kr. Nýprísur 6000,- kr.
Tlf. 371892

MITSUBISHI LANCER
árg. 88, sýnaður januar 2001, til søluf fyri 10.000 kr.
Tlf. 312365

PÍKADEKK TIL SØLU
Tvey píkadekk 155 x 13" dekkini eru sum nýggj, 500 kr.
Tlf. 284445 ella 321647

TIL SØLU
Kølari til Toyota Carina II, árg. 87, í góðum standi, 400,- kr.
Tlf. 284445
ella 321647

MOTORUR
til Toyota Carina II árg. 86, prísuppskot: 800 kr.
Tlf. 284445
ella 321647

DIESEL MOTORUR
Diesel motorur til søluf, Toyota 1C, prísuppskot: 2.500,-.
Tlf. 284445 ella 321647

TOYOTA COROLLA 1.3
til søluf. Er frá juni 99, við fylgja summardekk á sportfelgum og píkadekk á felgum.
Ring 372496

FORD SIERRA TD
Ford Sierra turbo diesel 1.8, árg. 91, í sera góðum standi, vínreyður, minsta boð 50.000 kr.
Tlf. 370531 ella 210531

MAZDA 626
Hvítur Mazda 626 GLX 2000 við powerstýring, el-rútar og sóltak í góðum standi, árg. 88.
Tlf. 441347

PEUGEOT 205 VAN
árg. 88, koblingin virkar ikki og er annars í góðum standi, bíliga til søluf.
Tlf. 449934 ella 252959

OPEL ASCONA
árg. 11/86, diesel, til søluf.
Tlf. 222184

TIL SØLU
Nýsýnaður Subaru GL 1,8, í hampuligum standi, bíliga til søluf.
Tlf. 233242

FORD COURIER
Ford Courier Diesel til søluf.
Tlf. 218540

SPORTSFELGUR
15" sportsfelgur, 4 hol, við góðum dekkum, til søluf fyri 3000 kr.
Píkadekk á felgum til Volvo bíliga til søluf (sum nýggj).
Tlf. 222220

FORD P100
diesel Hardtop, nýsýnaður, árg. 1991, til søluf.
Tlf. 441888

VOLVO 245
st.car árg. 1984 til søluf fyri 8.500 kr.
Tlf. 216620

MAZDA 626
árg. 1984 til søluf, krevur ábøtur sum sveisa skermin innan hørgrumegin og varmaapparat, koyrir gott, nøgvir deilir fylgja við, søluprísur 3.-3.500 kr.
Tlf. 222446

FORD ESCORT VAN YNSKIST
Ein Ford Escort 1.4 Van kassabilur ynskist til keyps sum eykalutir, um nakar eigur ein, so vinarliga ring tlf. 424283 ella 214283

VW PASSAT
árg. 87 í góðum standi til søluf.
Tlf. 252502 eftir kl. 16

FORD SIERRA
árg. 90, sær gott út, hevur sportfelgur, vel og spoylarar. 130.000 km, til søluf fyri 20.000 kr.
Tlf. 441405

MAZDA 626 GLX HB
árg. 85, krevur smærri ábøtur, uttan plátur til søluf fyri 10.000 kr.
Tlf. 254396

MITSUBISHI GALANT 1.8 TD
árg. 90, sýnaður des. 2000, í sera góðum standi, til søluf fyri 48.000 kr.
Tlf. 315982 ella 282246

CITROEN BX 16
árg. 90, til søluf, góður motorur, heilt lítið rustaður. Krevur sbrt. sýni ábøtur fyri uml. 15.000 kr.
Tlf. 318269 ella 212173

FIAT SEICENTO 1.1
Fiat Seicento 1.1 Sport árg. 98, koyrt 17.000 km, heilársdekk fylgja við í keypinum. Nærri fæst at vita á tlf. 316490 eftir kl. 18.00

FORD SIERRA
Nýsýnaður Ford Sierra árg. 87 til søluf.
Tlf. 221365

SUZUKI GS 550
árg. 78 til søluf.
Tlf. 221365

NISSAN PATROL
árg. 85, nýsýnaður til søluf.
Tlf 281032

TIL SØLU
Fýra lítið brúkt Gislaved Nord Frost píkadekk, 165-80-13, til søluf.
Tlf. 221347

EYKALUTIR TIL
Toyota Carina ST 171, árg. 88-91. Hurðar, bakrútur, siðarútur, startari, el rútavindara, drívaksil, tendring og spegl - H.
Tlf. 455843

OPEL ASCONA 1,6
Árg. 87, við skaða, verður seldur heilt bíliga. Kom og síggj. Nógvir eykalutir fylgja við.
Tlf. 375055

Arbeiði

ALT FYRIFALLANDI
arbeiði verður gjørt av tilkomnum manni, ið er handverkari.
Tlf. 310352

FRISØR
Dámar tær væl at seta hár og leggja make up, so er hetta nakað fyri teg. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 316515 ella 311683 millum kl. 12-13 og aftaná kl. 19.00

Barnaansing

SØKT VERÐUR
eftir gentu/kvinnu at ansa eftir 3 børnum frá 15. mars. Áhugaðar kunnu ringja.
Tlf. 0045 24421721

SØKT VERUR
eftir kvinnu at ansa eftir 1 ára gomlu Guðrun frá 1. februar til 1. august 2001. Væntast kann, at ansingartíðirnar verða skiftandi. Áhugaðar kunnu ringja á
tlf. 314061

Í KEYPMANNAHAVN
fyrst í komandi ári til juli. Vit søkja eftir eini gentu/konu til at ansa eftir lítla Tóri 30 tímar um vikuna. Lønin er sambart avtalu við Københavns Kommune. Ert tú áhugað ella kennur tú onkran sum kundi havt áhuga so kunna tit ringja til okkum á
tlf. 38 34 33 99

Barnaútgerð

BILSTÓLUR
Bilstólur Góður bilstólur av merkinum Chicco 9-18 kg. til søluf fyri 350 kr.
Tlf. 313200
(eftir kl. 18)

BILBARNASTÓLUR
til 0-13(18) kg, 17 mør. gamal, til søluf fyri 300 kr.
Tlf. 424481

BILBARNASTÓLUR
upp til 13 kg, til søluf fyri 400 kr. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 319814

SIMO BARNAVOGNUR
Simo barnavognur, 1 ára gamal við Simo lyft, Simo puslitaska, regnslag og flugunet. 92 cm. liggimál, lítið brúktur og sær út sum nýggjur til søluf fyri 3800,- kr.
Tlf. 447275

YNSKIST
Avlangur tvíburða/systkinavognur ynskist til keyps.
Tlf. 319511 ella 224410

BRIO KOMBIVOGNUR
inkl. koyriposa og standibretti selist fyri 2.000 kr.
Tlf. 315552

BRIO BARNAVOGNUR
Sera væl viðfarin Brio barnavognur við tilhoyrandi lift, dýnu og fluguneti, myrkabláur við ternutum myndstri, til søluf fyri 2.800,- kr.
Tlf. 312056

YNSKIST
Koyristólur við kalesju í góðum standi ynskist. Tlf. 320325

Bátaútgerð

BÁTUR TIL SØLU
Føroyskt bygt 4-mannafar við trakt til páhangara, í góðum standi, til søluf. Prísuppskot 13.000 kr.
Tlf. 375222, e. kl. 18

BÁTUR YNSKIST
Føroyskt bygt 5-mannafar í góðum standi, og helst væl útgjørt, eisini er ynskiligt at trakt er til páhangara, tó eingin treyt.
Tlf. 375222, e. kl. 18

TIL SØLU
Tvær DNG íslandssnellur, D-6000 i, og tvær DNG frá 86 til søluf, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 371676 - 288676

YNSKIST TIL KEYPS
Brúkt toppstykki til Sabb diesel bátamotor, typa 2 G - 22 HK, ynskist til keyps.
Tlf. 448040 ella 211570

YNSKIST TIL LEIGU
Bátur ynskist til leigu til várútróðurin.
Tlf. 373597

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Bræva skifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:

Navn:…….

Bústaður:……

Bygd/býur:……

Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

BÁTAMOTORUR
165 HK Volvo Penta bátamotorur við drev, í góðum standi, einans koyrt ca. 1500 tímar, verður seldur um hóskandi boð fæst.
Tlf. 213666

BJARGINGARÚTGERÐ
Vestar, kransar, rakettir, bluss, sløkkiútgerð.
Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

EKKOLOD – GPS
1 stk. ekkolod Eagle Supra I.D. Prísuppskot: kr. 2.500,- Garmin GPS 45 (berbarur) og monterast, prísuppskot: kr. 3.000,-
Tlf. 287904 ella 214304

4-MANNAFAR
4-mannafar ella annar bátur um somu stødd, úr glastrevju, uttan motor, ynskist til keyps.
Tlf. 333325

Bingo

BINGO
verður í Mettustovu mánakvøldið 12. febr. kl. 19.
Kvinnufelagið

GOTT BINGO
verður í Havnar Klubba mánakvøldið 15. febr. kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Koyring heim.
Føroya Astma/allergifelag

BINGO
sum skuldi vera 4. febr., verður tórsdagin 8. febr. kl. 19.00.
VB

BINGO
verður í Pálsstovu leygardagin 10. febr. kl. 15. 15 plátur fyri 100 kr. Full plátt 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðli m.a. apex-ferð. Drigið verður millum spølini. Eykapæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 11.2. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli mikroovnur. Eykapælið 1400 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

Bøkur

TIL SØLU
10 bind »Sket«, søga og hendingar í 20. øld, alt í teksti og myndum, til søluf fyri 400 kr.
Tlf. 321915 / 220660

TIL SØLU
70 »Barnabløð« frá 1971 til 1979 til søluf fyri 300 kr.
Tlf. 321915 / 220660

ALFRØÐI 1 OG 2
Er tað nakar, ið kann selja mær bøkurnar Alfrøði 1 og 2?
Tlf. 315385

NÓGVAR BØKUR
Frílesnaður, søga og romanir. Alt bíliga. Tlf. 311915 og 220660

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Tannm sum hevur funnið mína Siemens S35i GSM fartelefon 3. feb. á Prix Føroyum á Strondum, vinarliga set teg í samband við meg á
tlf. 311770

HÚGVA FUNNIN
í Kunoyar tunlinum, møguliga Top barnahúgva. Í húgvuni stendur J.A. Eigarin kann ringja
Tlf. 456163

FUNNIÐ
Barnataska við svimjiklæðum gloymd í Tógvhandlinum Hespuni í desember.
Tógvhandilin Hespan Tlf. 318737

»LØBEHJUL« HORVIÐ
1. febr. kl. uml. 16.30 er mítt »løbehjul« horvið í garderobuni á barnabókasavninum. Navn undir botninum. Bronsu/silvur av slagnum Speed Runner. Ring til Helga Daniel, tlf. 312844

ER TAÐ NAKAR
sum av misgávum umborð á Trónda fyri ca. 14 døgum síðani hevur tikið ein beriposa við eini hvítari blusu, cowboybuksum og einum skóm. Gerið so væl at ringja tlf. 361366

LYKLATYSSI BURTURMIST
á vegastrekkinum Traðargøta 12-47 og Traðartún 7. Í lyklatyssinum eru billykil - 2 reyðir Rukolyklar, 1 grønur og 2 gráir.
Vinarliga ringið 312292

HEVUR NAKAR
funnið mína mappu, mist í SMS 22. des. koyrikort og onnur pappír í. Vinarliga ring tlf. 333038 ella 223084

HARRA UR
burturmist í Klaksvík 16. d es. Finningarløn verður givin.
Tlf. 457258

Býli

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HAVN
Frá 1. mars er ein 35 fermetrar stór íbúð í vesturbýnum til leigu til fólk, ið fer væl um og ikki roykir. Leiga 3.300 kr. um mør. við ljósi og hita + 1 mør. depositum. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn, Bill. mrk. 07.02.

TIL SØLU
Húsini Í Poulshúsi á Eiði til søluf við garagu og hjalli.
Tlf. 423070, e. kl. 18

YNSKIST
Hava tygum eini hús ella íbúð at leiga mær og soni mínum?
Tlf. 313239 ella 317500, Fía

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par við einum barni ynskir íbúð ella hús til leigu í Havn. Vit eru friðarlig og fara væl um.
Tlf. 318233

YNSKIST
Er nakar, sum hevur ein hús til leigu. Húsini kunnu vera í Oyndarfirði, Hellunum, Skálabotni ella Fuglafirði.
Tlf. 445140 - 223068

STÓRT KAMAR
til leigu við øllum hentleikum til ikki-roykjara. Atgongd til køk, bað, myntteleon og vaskimaskinu. 5 min. gongd til Læraraskúlan.
Tlf. 313799

HANDILSHØLI
til leigu í miðbýnum.
Tlf. 253242

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarligt fólk ynskir íbúð í Havn. Hvørki roykir ella drekkur.
Tlf. 214474

ÍBÚÐ ELLA VERILSI
ynskist til leigu ella framleigu skjótast gjørligt í Keypmannahavnar ella Herlev umráðnum. Eg eri 23 ár, sjúkrasystralesandi, friðarlig og roykir ikki.
Tlf. 332591 / 218591, Ruth

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit leita eftir eini íbúð við 2 ella 3 soviverilsum í miðstaðarøkinum ella í Runavíkar kommunu. Vit eru friðalig, fara væl um og gjalda til tíðina. Tlf. 321148,
annika_j@post.olivant.fo

EG ERI EIN
25 ára gamal pedagog lesandi, ið fegin vil hava eitt kamar til leigu. Eri friðarligur og fari væl um.
Tlf. 217023

ÍBÚÐ
Eg eri ein mamma við einari 8 ára gamlari diddu. Vit ynskja eina íbuð ella eini lítil hús skjótast. Vit eru friðaligar og fara væl um.
Tlf. 310383

HÚS Í VÁGI
Um nóg høgt boð fæst, selji eg hús mítt í Lágabø.
Tlf. 373874 ella 289174

MAMMA
við trimum børnum søkir íbúð á Argjum. Skriva til: Sosialurin Box 76 110 Tórshavn Bill.mrk. 0169

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur maður ynskir íbúð 1. apríl 2001 í Tórshavn. Vinarliga ring 316490 ella 253079, Gert

ÍBÚÐ YNSKIST
í Havn ella nærhendis til tvey vaksin og eitt barn, má hava 2-3 kømur.
Tlf. 216151 ella 316716

HJÁLP!!!
Vit eru eitt ungt par, ið sóknast eftir eini íbúð í Havn fyri max 4.000 kr. um mør. við ljós og hita. Eru friðarlig, hava fast starv og gjalda til tíðina.
Tlf. 251287

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt par í 20-unum ið sóknast eftir eini íbúð í høvuðsstaðarøkinum fyri max 4.000 kr. um mør. við ljós og hita. Vit hava bæði fast starv, fara væl um og eru friðarlig.
Tlf. 321026

HJÁLP – HJÁLP
Vit eru eitt par við tveimum børnum, sum eru uppsøgd til 1. feb. Vit ynskja at leiga lela at keypa hús í Klaksvík – kanst tú hjálpa?
Tlf. 457159 ella 220603

ÍBÚÐ YNSKIST
Par við tveimum børnum søkja íbúð ella hús í Kollafirði, Leynum, Kvívík ella Hósvík sum skjótast.
Tlf. 283141 ella 421178

HAVA TYGUM
ein kjallara í Havn, sum eg kann innrætta til íbúð fyri síðan at leiga fyri eina tíð, saman við konu míni og okkara trimum børnum.
Vinarliga ring: tlf. 318758, 221656, Anton Petur

ÍBÚÐ YNSKIST Á TOFTUM
ella nærhendis skjótast gjørligt til ein 25 ára gamlan mann, farið væl um havi fast starv.
Tlf. 252943

KAMAR ELLA ÍBÚÐ
ynskist til leigu, helst í eysturbýnum. Vinarliga ringið á
tlf. 220910 eftir kl. 16.00

STÓRT VERILSI
til leigu v/ øllum hentleikum v/ atgongd til køk, bað, myntteleon og vaskimaskinu. Leigari má ikki roykja. 5 min. gongd til Læraraskúlan.
Tlf. 313799

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.
Tlf. 311197 Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~debes E-postur: debes@post.olivant.fo

Bústaðarveiðan

Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðan fyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.
Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.

Nr. 877
Stað: Vestara armi á Skálafjørðinum til Selatraðar
Slag av veiðu: Sethús ella íbúð
Stødd: Ikki ov stór
Ynskir: Alt hevur áhuga
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 500.000,-

Nr. 878
Stað: Í Sandoynni, helst á Sandi ella Skopun
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Ikki ov stór
Ynskir: Kunnu sjálv gera ábøtur um neyðugt
Kostnaður: Undir kr. 200.000,-

Nr. 880
Stað: Tórshavn (miðbýnum ella nærhendis)
Slag av veiðu: Hús, vælegnað til vinnulig endamál
Stødd: Einki krav (Kunnu sjálv gera ábøtur um neyðugt)
Kostnaður: Mesti kostnaður uml. kr. 1.000.000,-

Nr. 881
Stað: Tórshavn/Argir
Slag av veiðu: Sethús ella tvíhús
Stødd: Uml. 140 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður uml. kr. 1.600.000,-

Nr. 883
Stað: Tórshavn
Slag av veiðu: Íbúð
Stødd: Uml. 60–70 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 400.000,-

Nr. 884
Stað: Tórshavn, eysturbýnum
Slag av veiðu: Sethús ella tvíhús við kjallara
Stødd: 3–4 kømur (helst garagu ella møguleika til tess)
Kostnaður: Einki krav

Nr. 885
Stað: Norðasta Horn ella Argir
Slag av veiðu: Sethús
Stødd: Egnað til familju við 2-3 børnum
Kostnaður: Umleið kr. 1.100.000,-

Grundøkir

Nr. 882
Stað: Norðstreymoy ella Skálafjørðinum
Slag av veiðu: Jørð - Grundøki
Stødd: Uml. 1000-15000 m²
Kostnaður: Mesti kostnaður kr. 200.000,-

Húsamekling

Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16
Keyp og søla av fastari ogn

Dansur

ARGENTINSKUR TANGO
Í vikuskiftinum 9.-10.-11. feb. verður skeið í argentinskum tango við Bente og Bo Pedersen frá Århus Tango-Akademi. Skeiðið verður fyri byrjarar/ávegis vand og fyri vand. Dansað verður í auluni í Studentaskúlanum í Hoydølum. Kostnaður: 300,-. Harumframt verður undirvising fyri einstaklingar/pør. Kostnaður: kr. 200,-/kr. 300,- Tilmelding: Siri Eysturoy tlf. 310506, fax 316610 e-mail: siri@post.olivant.fo ella Kára Heinesen, tlf. 310585, fax 320533 e-mail: kara@post.olivant.fo

Dýr

LABRADOR HUNDUR
Tvey ára gamal, ektaður, góðsligur, vælvandur, svartur labrador til søluf fyri 2.000 kr. vegna serligar umstøður (barna-allergi).
Tlf. 311603

FRENSUR HORVIN
Reyður frensur burturblivin á Berjabrekku. Hevur nakar sæð hann, vinarliga sig frá á
Tlf. 318633

HESTUR TIL SØLU
Íslendskur hestur til søluf.
Tlf. 224412

KANINUR TIL SØLU
Kaninur til søluf fyri 50 kr. pr. stk.
Tlf. 311861 eftir kl. 17

KETTLINGUR
Fæst beinanvegin. Fitt og reinlig. Hon er fødd 04.11.2000.
Tlf. 313492/222131

KETTLINGAR
Kettlingar vera latnir djóravinum.
Tlf. 457654 ella 217430

KETTLINGUR
Ein sera fittur kettlingur, trílittur, 8 vikur, kann fáast.
Tlf. 214884

SKJALDBØKUR
Eg sóknist eftir tveimum lítlum skjaldbøkum, evt. í umbýti við tvær størri skjaldbøkur.
Tlf. 316099 ella 212491

Fundir

TAMBAR
Aðalfundur verður 27. febr. kl. 20 í venjingarhøli felagsins.
Nevndin

AÐALFUNDUR FELAGSINS
verður í MBF-húsinum leygardagin 10. febr. kl. 14.00. Við á fundinum verður Petur Ellefsen, lækni. Høvi verður at seta spurning til læknan.
Nevndin

AÐALFUNDUR
Roysnið hevur aðalfund fríggjadagin 16. februar kl. 18.00. Skrá sambært lóg felagsins.
Nevndin

ÁRSAÐALFUNDURIN
hjá Sjóvar Sóknar Arbeiðarafelag verður í Stranda Centrum leygardagin 17. febr. kl. 16.00, og ikki sum áður lýst 10. febr. Verður aðalfundurin ikki viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur hálvan tíma seinni. Fundarskrá: sambært lógum felagsins.
Nevndin

STUÐLARNIR HJÁ AB
Stovnandi aðalfundur av stuðulsfelag verður í AB-húsinum mikukvøldið 28. febr. kl. 20.00.
Nevndin

ARGJA BÓLTFELAG
Aðalfundur felagsins verður í AB-húsinum mikukvøldið 28. februar kl. 19.00. Skrá sambært lógum felagsins. Mál, sum krevjast viðgjørd á fundinum, mugu vera nevndini í hendi innan 7. februar.
Nevndin

Húsarhaldstól

ZANUSSI VASKIMASKINA
bíliga til søluf.
Tlf. 332404, e. kl. 18